Líti› sannførandi hjá ÍF

Hóast hvalbingar vóru sera illa manna›ir, so tók ta› sína tí›, á›renn fuglfir›ingar fingu sett hol á málskjótingina

Fuglfir›ingar eru best fyri í strí›num um møguleikan at spæla um eitt pláss í bestu deildini. Teir í Fuglafir›i vóru í bestu deildini í fjør. Mótsatt flestu av hinum li›unum í næstbestu deildini hava teir í ÍF leikskrá, sum ivaleyst gevur eitt fitt íkast til raksturin og sum bo›ar frá eitt sindur av 1. deildarsni›i.

Áhugin fyri leygardagsfótbólti tykist vera lítil í Fuglafir›i, og avriki› ímóti Royn bo›a›i avgjørt ikki frá 1. deildarstø›i.

Allan 1. hálvleik vóru hvalbingar bara tíggju á vøllinum. Teir høvdu ongan á beinkinum, og sí›sti útispælarin, sum ikki tóktist hava vant í heilt langa tí›, kom ikki á vøllin fyrrrenn eftir ste›gin.

Ivaleyst kunnu hvalbingar skemta sær vi›, at teir áttu at spælt vi› tíggju monnum alla tí›ina. Tí so leingi, sum teir vóru undirmanna›ir, gekk heilt væl. ÍF hev›i bóltin mest sum allan 1. hálvleik. Teir løgdu stórt tr‡st á mi›verjuna hjá Royn, sum var manna› vi› Óla Jensen, Tóroddi Niclasen og Regini Thomsen, og teir høvdu eina rúgvu av møguleikum ímóti málinum hjá Bjarna á Hólalagi, men heimali›i› fekk ikki hol á.

Og so hendi ta›, sum er so væl kent í fótbólti. Royn fekk fimm minuttir undan ste›ginum bóltin fram ímóti ÍF málinum, og ta› eydna›ist Allani Michelsen at fáa mál.

Í 2. hálvleiki royndi ÍF at toga spæli› út í sí›urnar í sta›in fyri bara at oysa bóltin í brotsteigin, og tá sekundvísarin var á veg runt a›ru fer›, var javnt. Ey›un Ryggshamar streyk ígjøgnum í høgru, og Rúni Petersen, sum á ÍF mi›vøllinum hev›i størstu tyngdina, inntil hann eitt korter undan leikloki var› skiftur út, smekka›i úr tólv metrum flatt í máli›.

ÍF kom framum, tá ein tími var farin. Vongverjin í høgru, Torstein Joensen, heilflukta›i vi› nærra stólpan, eftir at Bár›ur á Lakjuni hev›i lagt neyvt innfyri úr høgru. Níggju minuttir seinni sta›festi Mortan Thomsen heimasigurin vi› skoti úr 22 metrum. Stø›an uppstó›, eftir at Royn verjan hev›i roynt at rekja eitt tvey samanspæl millum Bár› á Lakjuni og innskifta Høgna á Lakjuni upp. Bólturin sat dygst undir samankomingini.

Í 2. hálvleiki hev›i Royn ein møguleika. Stø›an var 1–1, tá spælandi venjarin, Zoran Mancic kom leysur, men Erling Joensen bjarga›i.

jh

ÍF–Royn 3–1 (0–1)
0–1: Allan Michaelsen 40.
1–1: Rúni Petersen 47.
2–1: Torstein Joensen 60.
3–1: Mortan Thomsen 69.

Vónin kom aftur til Vágoynna

Eftir at teir hava veri› púra sørir sí›ani summarsteg›in, bragda›i endiliga hjá vágamonnum, sum vi› sigrinum á B71 lyftu seg av botninum

JÁKUP MØRK

FS Vágar-B71 2-1 (0-1)

Undan dystinum skriva›u vit her í bla›num, at talan eftir øllum at døma var um seinasta útkall fyri FS Vágar. Enn er kappingin ikki li›ug, men fingust stig ikki burtur úr heimadystinum móti B71, tóktist ilt at síggja, hva›ani stigini skuldu koma.

Í fyrra hálvleiki var tó líti›, sum bendi á, at ta› júst var í hesum dysti, at ein møgulig bjarging skuldi finnast.

Heimali›i› byrja›i kanska betri, men so vi› og vi› tóku gestirnir yvir, og hóast ta› sum so ikki gjørdist talan um nakrar stórar málmøguleikar, so áttu sandoyingarnir alt tr‡sti›.

Um mi›jan fyrra hálvleik gav tr‡sti› eisini úrslit, men sum skilst á lagnum fingu sandoyingarnir tá eisini gó›a hjálp frá Remigius Mikocionis.

Julian Florescu dróg naka› vi› bóltinum, á›renn hann sendi tvørbólt til Høgna Hansen. Remigius var ávegis út eftir bóltinum, og allarhelst hev›i hann fingi› fatur á honum, men brádliga skifti hann ætlan, og bakka›i inn aftur í máli›. Úrsliti› var›, at Høgni brádliga gjørdist púra leysur og einsamallur vi› málverjanum kundi hann senda bóltin í neti›.

Naka› seinni hev›i Eli Hentze ein líknandi møguleika, men hann varna›ist ov seint, at Remi var komin í millumstø›u, so tá Eli royndi at lobba, var Remi komin aftur upp á pláss.

Hvat vágamenn høvdu fingi› at vita í hálvleikinum, er ilt at siga, men undir øllum umstø›um tóktist li›i› fulolkomuliga broytt, tá teir fóru á vøllin til seinna hálvleik.

Í nærdystunum tóktust teir nú nógv grammari, og ta› at Birgir var› settur í álopi› vi›førdi, at heimali›i› fekk betri tak á luftrúminum.

Ta› var eisini úr luftrúminum, at útjavnandi máli› há heimali›num kom. Hornaspark var› sent innfyri, og Birgir fekk sett pannuna á, so bólturin fór sendandi í máli›.

Naka› seinni fekk heimali›i› avgerandi máli›, og hóast ta› tóktist heldur rótut, so man ta› ikki nerta vi› gle›ina um sigurin.

Eftir at fríspark var› sent innfyri, var› bólturin fyrst sendur høgt upp loft, og tá hann so datt ni›ur millum vinir og fíggindar, var Hannus Olsen skjótur at smekka til. Waldemar sá valla, hvat gekk fyri seg, og spurningurin er helst, um ta› hev›i hjálpt naka›.

Málini øktu sjálvsagt um sjálvsáliti› hjá vágamonnunum, og eftir hvat skilst, var ta› nærri vi›, at heimali›i› økti um munin, heldur enn at gestirnir minka›u.

Bjargingin hómast

At kalla sigurin fyri tiltrongdan, man helst vera ein undirmeting av teimum heilt stóru.

Hóast dystirnir ikki ver›a spældir á pappírinum, so mundi hetta vera dysturin, har vágamenn sóu sær størstan møguleika at vinna stig, og fyri bjargingarroyndina var ta› tí av alstórum t‡dningi, at sigurin kom til høldar.

Styrktir í stø›u síni kunnu vágamenn nú gera seg til teir bá›ar seinastu dystirnar, og hóast hvørki GÍ ella KÍ ljó›ar av eini lættari uppgávu, so kann ta› tó vera til fyrimuns fyri vágamenn, at hvørgin av hesum hevur naka› at spæla.

Harafturat skal leggjast, at júst KÍ og GÍ hava havt ta› sera trupult móti FS Vágum, og henda sannroynd eigur í øllum førum at stu›la upp undir trúnna um yvirliving hjá vágamonnum.

Ein t‡dningarmikil li›ur í øllum hesum er tó eisini, um Tór-Ingar Akselsen ver›ur førur fyri at taka lut í teimum bá›um seinastu dystunum.

Sunnudagin var hann enn ikki komin fyri seg eftir ska›an, sum hann fekk móti B36, men sum skilst, vóna vágamenn, at hann ver›ur førur fyri at spæla komandi vikuskifti›.

FS Vágar-B71 2-1 (0-1)
0-1: Høgni Hansen 28
1-1: Birgir Joensen 59
2-1: Hannus Olsen 68

FS Vágar:
Remigius Mikicionis – Ey›finn Fjalsbak, Zylvanius Zudis, He›in Joensen – Kim Poulsen, Hannus Olsen, Igoris Kirillovas, Albert Ari Thomassen, Rimvydas Bakus – Sonni Johansen, John Johansen

B71:
Waldemar Nowicki – Bergleif Sólsker, Jón Brekku, Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen – Kári Nielsen, Julian Florescu, Bjørn Thorsteinsson – Machael Jørgensen, Eli Hentze, Høgni Hansen

Hóast B71 í fyrra hálvleiki var omaná móti vágamonnum, so eydna›ist ta› illa sperdu heimamonnunum at venda dystinum til egnan fyrimun

Mynd: Edvard Joensen

Sumba brúkti høvdi›

Øll málini hjá sumbingum vór›u skora› vi› høvdinum ímóti KÍ, sum var frammanfyri vi› tveimum málum, men ikki megna›i at halda tørn

KÍ líkist langt ífrá li›num, sum í fjør vann gullmerkini, og sunnudagin bleiv aftur talan um stigamiss, tá teir vitja›u á Krossinum

Mynd: SJH

Sumbingar fingu eitt stig burturúr vitjanini av KÍ. Tá teir í Sumba hugsa um vánaligu byrjanina – teir komu afturum 2–0 beinanvegin – so kunnu teir vera nøgdir. Men fyri ta›, sum er eftir av kappingini, kann ta› hava avgerandi t‡dning, at sumbingar í sí›stu løtu ikki fingu brotssparki›, sum teir hildu seg eiga (klaksvíkingar vóru ikki so ósamdir vi› teir). Eftir innlegg helt Marek tvørturum Hallur Dam Joensen, sum hesa fer› var í álopinum hjá sumbingum. Álopsma›urin enda›i í svør›inum, men dómarin metti ikki, at talan var um brotsspark.

He›in á Lakjuni leg›i KÍ framum beinanvegin. Eftir horna frá Arnoldi Joensen í vinstru var He›in fyrstur á vi› nærra stólpan og snitta›i vi› høvdinum í handara sí›uneti›. Eitt korter seinni økti Ove Nysted til 2–0. Talan var um innlegg úr høgru frá Arnoldi Joensen. Fró›i Mortensen tóktist hava tak á, men hann misti, og KÍ álopsma›urin var fyrstur á.

Grei›a KÍ lei›slan bendi á stórsigur, men solei›is gekk ta› ikki. Vi› ídni og nærlagni, sum teir ikki hava víst í ár, spenti Sumba í. Teir vunnu nærdystirnar, teir høvdu viljan at skapa møguleikar, og teir innanfyri ein minutt – í 26. og 27. minutti – at javna. Í bá›um førunum var Nebosja Velkovic málskjútti, og í bá›um førunum brúkti hann høvdi›.

Fyrra máli› má mi›verjin Pazek taka á seg. Fyrst kiksa›i hann bóltin út til horna, og so kom Baja framum hann og stúta›i í máli›.

Í seinna førinum var talan um uppspæl í vinstru. Li›forma›urin Jan Poulsen spældi væl upplagda Eirik Joensen, sum sendi innfyri og í høvdi› á Baja.

Undirhaldandi

Spenningurin var tættur alla tí›ina, og ta› var sera undirhaldandi.

Klaksvíkingar fingu ongantí› fri›, men ta› eydna›ist teimum at koma framum aftur.

Eftir dupult útskifting – Hjalgrím Elttør og Ey›un Klakstein komu inn í høgra bor› – enda›i uppspæl millum hesar bá›ar vi› innleggi til He›in á Lakjuni, sum í brotsteiginum fekk høvi at temja og smekka í kassan.

Hetta var í 67. minutti. Tá ta› resta›u tíggju minuttir javna›i Sumba. Hallur Dam Joensen leg›i innfyri, og mi›verjin Bergur Vinther var púra leysur, tá hann stakk seg upp og drønstúta›i í KÍ máli›.

jh

Sumba-KÍ 3-3 (2-2)
0-1: He›in á Lakjuni 3
0-2: Ove Nysted 19
1-2: Nebosja Veljkovic 26
2-2: Nebosja Veljkovic 27
2-3: He›in á Lakjuni 67
3-3: Bergur Vinther 80

Sumba:
Fró›i Mortensen – Bergur Vinther, Marlon Kjærbo, Nikola Biberdzic – Hans Jákup Thomsen, Jan Poulsen, Sasa Tomajek, Spasojé Biberdzic, Eirikur Joensen – Hallur Dam Joensen, Nebosja Velkovic

KÍ:
Zoltan Kujundzic – Andrzej Pacek, Jan Andreasen, Símun Waag Høgnesen – Harley Bertholsen, Jan Joensen, Marek Vierzbicki, He›in á Lakjuni – Ove Nysted, Arnold Joensen, Rógvi Jacobsen

Sumba hevur skift venjara

Magni Eystan Á st‡rdi sumbingum sunnudagin, og samstavi› vi› Milan Cimburovic er hildi› uppat

Sumbingar høvdu n‡ggjan íblásara á beinkinum, tá KÍ vitja›i á Krossinum sunnudagin. At siga, at hann var á beinkinum, er ikki rætt. Magni Eystan Á hev›i ábyrgdina, men hann sat líti› ella einki á beinkinum. Í sta›in stó› hann uppi og koyrdi nógv undir sínar menn. Ta› tóktist at hjálpa væl.

Jonhard Vestergaard er forma›ur í Sumbiar Ítróttarfelag. Hann váttar, at nevndin leygardagin bo›a›i Milan Cimburovic frá, at samstarvi› teirra millum var hildi› uppat.

– Ta› er luturin hjá nevndini at taka avger›irnar – eisini tær ke›iligu. Spælararnir góvu fríggjakvøldi› til kennar, at teir vóru ikki nøgdir vi› stø›una. Nevndin vi›gjørdi spurningin, og vit gjørdu av at ste›ga vi› samstarvinum og at heita á Magna Eystan Á um at taka sær av li›num.

Forma›urin vil ikki siga meiri um hetta. Men vit skilja, at spælararnir hava ikki veri› nøgdir vi› tann leiklutin, sum venjarin hevur havt á beinkinum, og summir hava undrast á, at teir í Sumba bara hava vant tríggjar fer›ir um vikuna.

Magni Eystan Á var venjari hjá Sumba fyrrapartin av níti árunum. Hann stó› á odda, tá Sumba í 1991 royndi seg í 1. deild. Í 1998 hev›i hann ábyrgdina á beinkinum í seinastu umførunum, tá ta› ráddi um at bjarga plássinum í bestu deildini. Ta fer›ina eydna›ist ta›.

Milan Cimburovic hevur veri› venjari í Sumba sí›ani eftir summarste›gin í fjør. Hann er næsti venjarin, sum fær sekkin í ár. Fyri stuttum seg›i B36 sínum venjara úr starvi.

jh

MARKO´2000
SØLUSTEVNAN
Verður í ítróttarhøllini í Runavík 29. sept - 01. okt.

Luttakarar:
Skósølan Gøtugjógv
P/F Jógvan Weihe
Curri
Flísan
Sp/f Sirri
MB Tours
Sp/f Inventartænastan
Profa
Benetton
Hon & Hann
Klæmint Petersen
Tutl
Millenium
Máling og Gólv
Shop Inn
Brøður Petersen
Húðrøkt v/Jørnu
Feðgar
ABS Transport
AD-Import
Súkkluhandilin í Líðini
Esmar Simonsen
JH Møblar
Com-Data
AWI Boats
Barnaútgerð
OilWind
Sp/f Høgv

Undirhald
Eivør Pálsdóttir
Sámal Ravnsfjall
Niels Midjord
Vísumenn úr Klaksvík
Rúna á Heygum
Ronnie Poulsen
Magni Christiansen

Magni Poulsen er frásøgumaður í samband við mótasýningarnar

SANSIR · TEL 355355
http://marko.fsn.net
Marko Skrivstovan, Post Boks 172, FO-620 Runavík, Føroyar
Tel 22 22 50, Tel 22 22 51 Fax +298 44 95 35, e-mail: marko2000@ww6.fsn.net